

sosialurin

Minnist til tippingarseðlarnar

— teir skula vera okkum í hendi komandi mikudag.

Gerið so væl at merkja brævbjálvan »Tipping«, so ert tú vísur í, at seðilin kemur á rætta stað.

Um tippað verður, at heimaliðið (fyrst nevnda liðið) vinnur, skal setast eitt 1-tal í raðið undir »1«. Um tippað verður javnleikur, skal eitt x setast í raðið undir »x«. Um tippað verður, at útiliðið (aftara liðið) sigrar, skal setast eitt 2-tal í raðið undir »2«.

Bert eitt tekin kann setast út fyri hvønn dystin.

Um tekin verða sett í skeivt rað, er seðilin ógildigur. Setast skula bert 1-tøl í »1-raðið«, bert x í »x-raðið« og 2-tøl í »2-raðið«.

Bæði tipsrøðini mega verða eins útfylt. Raðið til høgru er eftiransingarrað tygara, soleiðis at tygum síggja, hvussu innsenda raðið varð útfylt.

Tipsseðilin verður at senda til: SOSIALIN, postrúm 76, 3800 Tórshavn í einum brævbjálva, merktur »Tipping«, og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin áðrenn leikdagarnar.



Liðið hjá Coventry. Teir sum koma til Føroya eru skrivaðir við feitari skrift. Aftast frá vinstru: Don **Nardiello, Bobby McDonald, Les Sealey, Mick Coop,** John Beck (nú Fulham). Í miðjuni frá vinstru: **Brian Roberts, Terry Yorath,** Keith Osgood, **Mick Ferguson,** Garry Gillespie, **Jim Holton,** Garry Thompson, **Tommy Hutchison,** Alan Green (nú Washington Diplomats). Fremst frá vinstru: **Steve Hunt,** Ray Gooding, Gordon Milne (Manager), Ron Wylie (assat. Manager) **Barry Powell** og **Ian Wallace.** Á myndini vanta Andy Blair og Jim Blyth.

Dysturin millum Coventry City, eitt av fremstu ensku 1. deildarliðunum, og 1. lið hjá HB verður á ovara vølli í Gundadali í kvøld

Í kvøld kl. 18.45 hittast HB og Coventry á ovara vølli í Gundadali, í einum dysti, ið HB hevur fingið í lag í samband við at tað í ár eru 75 ár síðani felagið varð stovnað.

Leikarnir á HB-liðnum verða hesir:

Høgni Mikkelsen, Hallur Andreasen, Eyðun Dal Christiansen, Óla Jákup Kristoffersen, Elias Mikkelsen, Arnbjørn Sivertsen, Ernst Dalsgarð, Heini Joensen, Heri Nolsøe, Regin Nolsøe, Suni Jacobsen, Kári Nielsen, Bent Jákup Højgaard Hansen.

Henning Sejstrup (TB), Sámal Vágalið (MB), Hans Leo í Bartalsstovu (GÍ) og Jógvan Gregersen (GÍ).

Ongin vinnari so vinningurin verður 500 kr.

Bert ein tippari hevði átta røtt tekin, allir hinir færri

Orsakað av at allir dystir seinasta vikuskiftið vórðu avlýstir, kom fyrsti tipsseðilin kanska at síggja eitt sindur annarleiðis út enn flest øll høvdu væntað.

Av teimum umleið 200, ið høvdu sent inn, var tað bert ein, ið hevði átta røtt tekin, meðan øll hini bert høvdu sjey ella færri røtt.

Orsakað av hesum verða tær 250 krónurnar, ið var vinningur til hendan seðilin standandi, og er vinningurin til tipsseðil 2, ið er galdandi til dystirnar hetta vikuskiftið, sostatt 500,— kr.

Kasta lut

Av tí at Fótbóltssambandið avlýsti átta av teimum 12 dystunum, ið stóðu á tipsseðli 1, vórðu vit noyddir at kasta lut hvussu tekini skuldu standa. Hetta tykist kanska mongum at vera heldur órættvíst, men um vit skuldu hava nakran møguleika fyri at finna nakran vinnara, var hetta einasta loysnin. Um dystir, ið standa á komandi tipsseðlum verða avlýstir, verður kastað lut um, hvar tekini skulu standa.

Bert eitt tekin til hvønn dyst

Í reglunum fyri hvussu tipsseðilin eigur at verða útfyltur stendur at bert eitt tekin kann setast út fyri hvørjum dysti. Hetta er eisini galdandi um ein av óvart kemur at seta tekin sítt á skeivt pláss; um hetta hendir má tekini ikki slettast aftur við at tað verður »maksað« yvir, men skal verða standandi ella skal nýggjur seðil útfyllast.

Navn:

Bústaður:

3

Hetta er eftiransingarseðil tygara

Leikdagar 19. og 20. mai

DYSTIR		1	X	2
B36 – NSÍ	(1. deild)			
KÍ – MB	(1. deild)			
HB – ÍF	(1. deild)			
VB – TB	(1. deild)			
Fram – Royn	(2. deild)			
EB – B68	(2. deild)			
SÍ – GÍ	(2. deild)			
HB – KÍ	(2. deild)			
B71 – Fram	(3. deild)			
NSÍ – SÍFa	(3. deild)			
TBb – Skála	(3. deild)			
B36 – St.ÍF	(3. deild)			

12 TEY RØTTU

Frá leikdøgunum 5. og 6. mai **1**

DYSTIR		1	X	2
ÍF – MB	(1. deild)		X	
HB – NSÍ	(1. deild)		X	
VB – B36	(1. deild)	1		
KÍ – TB	(1. deild)	1		
Royn – KÍ	(2. deild)	1		
Fram – GÍ	(2. deild)		X	
EB – SÍ	(2. deild)	1		
B71 – B36	(3. deild)	1		
ÍF – KÍ	(3. deild)		X	
Sumba – TBa	(3. deild)			2
B68 – St.ÍF	(3. deild)			2
Streymur – MB	(3. deild)		X	